6. september 2006

LANDSSTÝRISMÁLANEVNDIN
Føroya Løgting

**Keyp og søla av fiskiskipum, j.nr. 7.13-20060007[14] ks/td**

Í skrivi dagfest tann 17. august 2006 og sum Búskaparráðið fekk tann 30. august, hevur Landsstýrismálanevndin sett Búskaparráðnum fyrispurning um, hvussu eginpeningaviðurskiftini í einum partafelag kunnu væntast at ávirka lánstreytirnar hjá felagnum. Landsstýrismálanevndin ynskir serliga at fáa lýst undir hvørjum umstøðum - og uppá hvønn máta - ein peningastovnur kann væntast at seta sær sum treyt ávirkan á avgerðarrættin hjá einum lántakandi felag.

Landsstýrismálanevndin er í hesum sambandi serliga áhuga í skipafígging og Búskaparráðið hevur tí tikið støði í hesum og viðgjørt hetta evnið.

Fígging av føroyskum fiskiskipum er eyðkend av at lánsgevi í fylgju lóg um vinnuligan fiskiskap, ikki kann taka veðhald í teimun fiskiloyvum, sum eru knýtt at skipunum. Spurningurin um hvussu peningastovnarnir kunnu ávirka reiðaríið (lántakaran) er sostatt serliga viðkomandi um tað kann væntast at lánið ikki er fult tryggja í sjálvum skipinum, men at eisini fiskiloyvini heilt ella partvíst eru fíggjað við láni. Loyvi, sum í mótsetning til sjálvt skipið, ikki eru umfatað av veðhaldinum hjá penginastovninum.

## I.a. Eginpeningurin ikki avgerðandi

Búskaparráðið metir ikki, at tað ber til at seta eina mekaniska reglu fyri nær, og við hvørji láni prosent (fremmandakapitalprosent), tann lánigevandi peningastovnurin vil tryggja sær ávirkan á viðurskiftini í reiðarínum sum tekur lánið. Peningastovnurin vil vanliga ikki bert byggja sína meting og avgerð á skipið, sum er sett í veð fyri láni, men eisini onnur viðurskifti hjá lántakaranum.

Harumframt er eginpeningur – serliga innan fiskivinnuna – ikki nøkur eintýdd støðd. Óvissan skyldast ikki hvussu stór skuldin er, men tann veruleika at virðið á ognini hjá reiðarínum skjótt kunnu broytast. Serliga er tað virði av fiskiloyvum, ið sveiggja nógv yvir tíð, sum ger eginpeningin til eina flótandi støðd. Tá virðið av fiskiloyvum (og harvið eginpeninginum) sostatt ikki er nøkur óbroytilig eintýdd støðd, og tá lánið í skipinum vanliga leypur yvir fleiri ár, vil lánsveitarin vanliga ikki hefta seg alt ov nógv við hvat eginpeningurin er mettur at verða í tí løtu lánið verður tikið.

## I.b. Herd krøv við lán í fiskiloyvum

Meiri áhugavert enn lutfallið millum eginkapital og fremmandakapital tá lánið er tikið, er spurningurin um hvørjar møguleikar peningastovnurin kann brúka fyri at tryggja seg, um so er at lánið er veitt til at fíggja fiskiloyvini hjá skipinum.

Oftast vil ein peningastovnur, um lánið í stóran mun er grundað á fiskiloyvi og ikki bert virðið av sjálvum skipinum, stilla krøv sum avmarka møguleikarnar hjá reiðarínum at ráða yvir sínar ognir. Tess minni veð er í sjálvum skipinum, tess meiri víttgangandi vilja treytirnar verða. Treytirnar kunnu sostatt varða frá lítlari avmarking av til agerðandi ávirkan á reiðaríið.

Niðanfyristandandi verður gingið út frá, at peningastovnurin ikki metir veðhald í sjálvum skipinum sum nóg stóra trygd.

- Tann mest upplagdi møguleikin er at peningastovnurin krevur **eyka trygd**, t.v.s. borgan ella veðhald, ikki bert í skipinum men eisini í øðrum ognum hjá reiðarínum. Alt eftir hvussu umfatandi eyka trygdin er, so má hetta metast sum ein avmarkan av rásarúminum hjá reiðarínum, tí reiðaríið kann jú ikki læna uppá ta ogn sum longu er sett í veð til aðra síðu.

- Ein meiri umfatandi møguleiki er, um peningastovnurin krevur eina sokallaða **negativa veðhaldsváttan** (‘Negative pledge’) frá tí lántakandi reiðarínum. Við einari tílíkari váttan bindur reiðaríið seg til ikki at seta í veð ásettu ognina (eftir umstøðunum alla ognina), til aðra síðu. Tað er klárt at tess fleiri ognir, ið eru umfatað av einari sovorðnari negativari veðhaldsváttan, tess størri ávirkan gevur reiðaríið til tann lángevandi peningastovnin.

  Um so er at tann negativa veðhaldsváttanin umfatar alla ognina hjá reiðarínum (t.v.s. øll ogn sum kann væntast at innihalda veðhaldsfrítt frívirði), so kann reiðaríið í veruleikanum ikki taka onnur lán framyvir, uttan so at peningastovnurin, sum hevur fingið negativu veðhaldsváttanina, góðkennir lántøkuna í hvørjum einstøkum føri. Ein negativ veðhaldsváttan ber sostatt við sær – alt eftir hvussu stórur partur av ognini er umfatað av váttanini – eina munandi avmarking av ræðisrættinum hjá reiðarínum.

- Tann endaliga og størsta ávirkanin á tað lántakandi reiðaríið kann tann lánveitandi peningastovnurin tryggja sær við at krevja **veðhald í partapeninginum hjá reiðarínum**. Partapeningurin gevur ikki peningstovninum nakra eyka fíggjarliga trygd sum so. Tí um reiðaríið ikki kann gjalda sína skuld aftur, so er reiðaríið ógjaldsført og partapeningurin uttan virði.

  Veðhald í partapeninginum gevur sostatt ikki tí lángevandi peningastovninum nakra vanliga trygd. Men peningastovnurin tryggjar sær við veðhaldinum í partapeninginum ávirkan á viðurskiftini í reiðarínum. Alt eftir umstøðunum so kann talan verða um avgerðandi ávirkan.

**I.c. Lán upp á væntaða veiðu – men uttan veðhald**

Í omanfyri nevndu dømun hava vit bert víst á lánitreytir, sum kunnu væntast at avmarka ræðisrættin hjá tí lántakandi reiðaríi. Í verki vilja treytirnar koma fyri í øllum møguligum sniðum og samansetingum. Narkar treytir vilja í minni mun, aðrar í størri mun, avmarka ræðisrættin hjá reiðarínum.

At sovorðnar lánitreytir fyrikoma eigur, eftir fatan Búskaparráðsins, ikki at koma óvæntað á nakran nú fiskiloyvini í veruleikanum (de facto) hava ment seg til frítt umsetilig virði. Virðir sum ofta verða umsett til peningaupphæddir, sum í stóran mun liggja langt omanfyri virðið á skipinum sum loyvini hoyra til.

Tá loyvini eftir lógini ikki kunnu setast í veð, vil vinnan - og lángevarnir – royna at finna aðrar vegir, so at lángevarin í mest møguligan mun kan stillast, sum um loyvini vóru sett í veð. Tað er sannføring Búskaparráðsins at tað er meiningsleyst, at myndugleikarnir uppá tí einu síðuna geva loyvi til, at fiskiloyvini frítt kunnu kapitaliserast og umsetast, og uppá hina síðuna forða reiðarínum at stilla loyvini í veð.

Búskaparráðið vil her nýta høvi at undirstrika, at tað ikki bert er vantandi møguleikin at seta fiskiloyvini í veð, sum førir til lánitreytir, ið tryggja tí lánsgevandi peningastovninum ávirkan á ræðisrættin hjá tí lántakandi reiðarínum. Fiskiloyvi eru sera trupul sum lángrundarlag, tí virðið á teimum er ikki nøkur støðug stødd (sí I.a.). Virðið á loyvunum ávirkast bæði av fiskivinnupolitikkinum (nationalt og internationalt), natúrligum broytingum í veiðunøgd og av prísgongdini á heimmarknaðinum fyri fiski. Tað er tí klárt, at ein peningastovnur, sum fíggjar fiskiloyvum, yvirtekur ein part av váðanum hjá virkiseigaranum. Hesum í huga er tað tí ikki ónatúrligt at lánsveitari roynir at ávirka viðurskiftini á reiðarínum.

**II. Núverandi fiskivinnuumsiting óskynsom**

Sum heild metir Búskaparráðið, at núverandi (ó)skil, har fiskiloyvi verða kapitaliserað og umsett til upphæddir, sum fara langt upp um virðið á skipinum sum fiskiloyvi hoyrir til, má metast at vera óskynsamt. Virðið á loyvunum kunnu vera óviss og flótandi. Tí vil  núveradi (ó)skil bert geva vinnuni og lánsveitarunum ein ovurstóran og heilt óneyðugan váða.

Búskaparráðið heldur, at tað vildi minkað um váðan hjá fiskivinnuni og lánsveitarunum, um virðir av fiskiloyvunum ikki kundu kapitaliserast sum tey verða tað í dag, men ístaðin vóru uppkravd leypandi. Hetta kundi til dømis verið gjørt við einari regluligari sølu av fiskidøgum, ella við leypandi at uppkrevja eina tilfeingisrentu, sum var roknað og bert uppkravd um fiskivinnan hevði eitt yvirnormalt yvirskot (positiv tilfeingisrenta). Ein sovorðin uppkrevjing átti at verið tengd at einari ítøkiligari meting, sum eisini tekur fyrilit yvir fyri tí óskynsomu siðvenju sum higartil hevur valda á økinum.

Lógin um vinnuligan fiskiskap inniheldur eina reglu sum sigur, at hægst 1/3 av ognarrættinum til føroysk reiðarí kunnu verða á útlendskum hondum. Hendan reglan er løtt at umganga, hon kann ikki handhevjast, og hon elvir til strámannavirksemi. Hvat verri er, reglan beinur uppmærksomheitina burtur frá tí, sum veruliga er kjarnan í hesum máli.
 Tað avgerðandi er ikki, um reiðarin býr í Runavík ella Reykjavík. Tað avgerðandi er, um tilfeingisrentan verður tillutað privatum reiðarum ella tí føroyska samfelagnum, sum eigur tilfeingið. Búskaparráðið heldur, at tað er eingin ivi um, at tann skipanin, har vinnan betalur fyri rættin at gagnnýta fiskitilfeingið, førir við sær eina økta effektivisering av vinnuni. Men tað er undrunnarvert at tann politiski myndugleikin letur tað verða upp til tann sum selur fiskiskipið, vanliga reiðarin sum eru á veg út úr vinnuni, at uppkrevja virði av fiskiloyvinum frá keyparanum.

Fiskitilfeingið tilhoyrir samfelagi. Fyri rættin at gagnnýta tilfeingið eiga reiðararnir at gjalda eitt brúkaragjald. Til landskassan.
Búskaparráðið hevur avgjørt ikki at luttaka á fundinum. Búskaparráðið heldur seg ikki at hava serstakan førleika at meta um lógaruppskotið, ið ikki eru grundað á lærdóm úr búskaparfrøðini.

Búskaparráðið avmarkar seg til at viðmerkja, at lógaruppskotið óivað hevur við sær størri strámannavirksemi í fiskivinnuni. Tað má hugsast, at lógaruppskotið - í samband vid strámannavirksemið - fer at hava somu árin á vinnuna sum avmarkingin av útlendskum ognarskapi. Búskaparráðið skal haraftrat nevna, at tilvildarligar ognaravmarkingar fara neyvan at viðføra hægri - men hinvegin lægri - virkisførið (effektivitet) í fiskivinnuni.

Búskaparráðið hevur enn ta sannføring, at um ein vil hækka virkisførið í fiskivinnuni, so er treytin, at fiskirættindini verða sundurbýtt eftir búskaparligum skipanartreytum - uppboðssølu ella líknandi.

Búskaparráðið vísir harumframt til sínar viðmerkingar frá 18. august 2006 til løgtingsmál nr. 6/2006: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

Vinarliga
**FORMANSSKAPURIN Í BÚSKAPARRÁÐNUM**

Jørn Astrup Hansen
Formaður